



# r úti í Svínoy



koma væl við, tí tá vit seinni fóru at fregnast, høvdu kokkarnir júst oyst upp í tallerk nummar 450!

Efir at Ólavur Klementsen hevði sett stevnuna beint, vóru nógv ymisk tiltøk at skránni fyri bæði børn og vaksin. So nógv, at illa bar til at taka lut í øllum. Saman við eini 30 øðrum valdu vit at fara við Jógvan Edmund á Geilini eystur á Hjalla at hyggja at tí tiltiknu Árantsholuni, har Árant, sum segðist vera seyðatjóvur, fletti seyðin og goymdi krovini. Jógvan Edmund dugdi framúr væl at greiða frá søguni um Árant, so tað var ein fragd at sita og lurta og njóta góða útsýnið yvir móti Fugloynni.

Heima í bygdini hevði Havnarkórið við Ólavi Hátun tikið pláss frammi í kór í kirkjuni. Eftir langa túrin út í Árantsholu kendist tað fjálgt at sessast í kirkjuni at lurta eftir vakra sálmasanginum og hoyra Ólav Hátún greiða frá, hvussu tað bar til, at Havnarkórið var komið á Útoyggjastevnu. Ólavur er føddur og uppvaksin úti í Svínoy, har pápi hansara stjórnaði fyrsta føroyska bygdakórinum, sum eisini plagdi at syngja her í kirkjuni í 1920unum. Tí mundi tað kennast ikki sørt kensluborið fyri Ólav at fáa høvi at endurtaka søguna á hendan hátt meir enn áttati ár seinni.

Heri Joensen prestur, sum eisini er úr Svínoy, greiddi síðani hugtakandi frá søguni hjá kirkjuni. Sum eitt frískt og eitt sindur øðrvísi innslag fingu fólk eisini høvi at hoyra vøkru røddina hjá Barnaprix vinnaranum, Ingibjørg Hansen ú Mikladali, sum sang sálmin "Jesus hitt einasta", áðrenn seinasta felagssálmin.




## Várharra og ferðaætlanin

Ongin Útoyggjastevna uttan eina rætta togtogan, har oyggjarnar dystast móti hvørji aðrari. Fyri nógv var togtoganin uttan iva eitt av hæddarpunktunum á stevnuni, so spenningurin var stórur og rópini ofta øgilig, meðan togarnir reyðir í andlitið settu føtur í spenni og togaðu, alt teir vóru mentir.

Tey, sum ikki høvdu fingið hitan av at vera við í togtogan, kundi nú leita sær oman á støðna, har stóra bálið var við at verða tendrað, og Bjarni Jacobsen helt bálrøðuna.

Summi vóri nú eisini so smátt farin at halda seg framat onkrum av bátunum niðri á keiini at sleppa sær heimaftur. Ta einu løtuna sá tað eitt sindur ivasamt út við næsta túri, so onkur av gestunum fór at sóknast eftir eini ferðaætlan.

– Ferðaætlan? Nei, okkara ferðaætlan er tað bara Várharra, ið ræður fyri, so tú mást bara vera klárur tá hann er, helt ein svínoyingur smílandi fyri. So í staðin fyri at ótolnast settust fólk at njóta frálíka útsýnið yvir Svínoyarvík og fegnast um eina avbera væleydnaða Útoyggjastevnu. Tey flestu bíðaðu tó til seinasta túr við Másanum, tí enn var nógv eftir av kvøldinum. Og fyri tey, sum gistu, bíðaði ein lang og góð dansinátt í góðum vertskapi við bæði enskum og føroyskum dansi.





